# James Bond fyri allar pengarnar

Filmsummæli

**Olsen, Theodor Olsen**



Tað finnast tvey sløg av filmum. Teir uttan biljagstranir, og teir sum vísa biljagstranir. Nýggi Bondfilmurin hoyrir til teir seinnu.

Tann loyniligi agenturin, sum allur heimurn hevur kent í nógv ár, er nú aftur aktuellur, og »Die Another Day« er tann tjúgundi í røðini. Og lat meg siga tað beinanvegin: Hann er undirhald fyri allar pengarnar. Pengarnar, sum hann hevur kostað bæði filmsframleiðara og teimum ongu sponsorunum, hvørs merkivørur síggjast aftur í ovurnýtsluni hjá James Bond, ið kortini ongantíð noyðist at spara nakratstaðni.

James Bond klárar nevniliga at fylgja við tíðini. Hesaferð eru tað norðurkoreanarar, sum eru »The Bad Guys«, og Bond ætlar at forða nøkrum misteinkiligum vápnahandilsmonnum í teirra ógerningum. Men hann verður verður lumpaður og noyðist at sita í einum ótespiligum norðurkoreanskum fongsli í 14 mánaðir – og tað kann undir ongum umstøðum samanberast við klivarnar í Jónas Broncksgøtu í Havn.

Tá hann verður leyslatin líkist hann meira einum listamanni úr Kirkjubø enn einum gentlemanni úr bretsku fregnartænastuni. Heimafturkomin til London verður hann uppsagdur av bossinum hjá sær, M, og síðani byrjar dystum hjá einum einsamøllum manni at finna tann, sum snýtti hann.

James Bond er tó ikki einsamallari enn so, at hann altíð hevur eina vakra kvinnu ella tvær við sína lið. Hesaferð er tað serliga Jinx (Halle Berry), sum Bondkennarar vilja vera við skal sipa til Ursula Andress í »Dr. No« frá 1962.

Men sum sagt dugir Bond at dagføra seg. Eisini tá talan er um javnstøðu, so fræg sum hon nú kann blíva hjá James Bond. Jinx er ikki nakað tilvildarligt ferðasteyp, men ein beinharður agentur eins og Bond sjálvur, og ofta er tað hon, sum bjargar honum. Tað er eisini hon sum er omaná í teimum filmsbrotunum, sum eru loyvd í Evropa, men sum amerikanski sensururin ikki loyvir sínum landsmonnum (og – kvinnum) at síggja.

## Kuba, Korea og Ísland

Saman berjast tey ímóti tí øra brotsmanninum, Graves, sum er vorðin ríkur av at selja ólógligar gimsteinar. Pengarnar brúkar hann til at gera eitt rúmdarvápn, sum sjálvt Bush hevði avtikið deyðarevsingina og skrivað undir Kyotosáttmálan fyri at fingið fatur á. Vápnið megnar nevniliga at savna alla sólorku í eina strálu, sum kann brenna hvat tað skal vera á jørðini, og tað er uppkallað eftir Ikaros úr griksku gudalæruni. Tað var hann sum vildi flúgva upp til sólina, men brendi veingirnar og datt í havið, og so kann man gita, hvat fer at henda.

Hvussu leikur fer, skal tó ikki avdúkast her, tí Bond fær úr at gera á ferðum sínum til Korea, Kuba, Onglands og ikki minst Íslands, har Graves hevur bygt eina velduga ísborg – og hon skal upplivast í biografinum. James Bond-fjepparar fáa nevniliga tað, teir ynskja: effektir, action, vakurleika og ikki minst eitt stuttligt og vælskrivað handrit. Tann ongantíð ráðaleysi Bond dugir líka væl at svara fyri seg, sum at handfara kvinnur og skammbyrsur. Og at leypa umborð á ein flúgvara, beint áðrenn hann fer upp frá ella at stýra einum tanksi á eini minufløtu fellur honum heldur ikki so tungt. Bond er snøgt sagt óførur, og Pierce Brosnan spælir leiklutin til fulnar.

Bond fylgir sum sagt við tíðini. Umframt at James Bond hevur eitt sponsorerað ur um skøvningin og viðhvørt kanska minnir eitt sindur meira um Schwarzenegger enn Sherlock Holmes, so er nógv av filminum gjørt við teldu. Hesaferð oyðileggur tað ikki filmin, at hann er á markinum til at líkjast einum spæli í Play Station, heldur enn at fortelja eina søgu um tað, sum er næstan menniskjasliga møguligt, men her skulu filsskapararnir ansa sær. Ella gleða seg til teldurnar verða betri.

James Bond er tó hin sami, hóast tíðirnar og kvinnurnar skifta. Tónleikurin hjá Madonnu riggar væl til alla ta tøkniligu útgerðina hjá heimsins kulasta agenti, hvørs livur eftir 40 ár og 20 filmir enn noyðist at góðtaka nógvar Martini, sum eru »shaken, not stirred«. James Bond er ikki uppilagstur enn og sær ætlar sær nokk at leggja seg at doyggja eina aðru ferð. Alt broytist, men James Bond er hin sami, og tað mugu vit eisini hava í huga, tá vit sessast í teimum føroysku biografunum og hyggja at, meðan Pierce Brosnan á teimum nýstroknu løkunum eymligt og tvítýðugt teskar til Halle Berry »You're good even when you're bad«, og tann danski undirtekst-urin so romantiskt umsetur tað til »den er god med dig«.

### fakta um James Bond - Die Another Day

| | |
|---|---|
| leikarar: | Pierce Brosnan, Halle Berry o.o. |
| leikstjóri: | Lee Tamahori |
| longd: | 2 tímar og 13 min. |
| stað: | havnar bio, um tú ert 12 ár ella eldri |

# Ung orð: Fjølmiðlar fara eisini ov langt

Ja, so haldi eg, at vit hava sæð alt, sum vit hava brúk fyri!

Hetta var millum annað tað, sum eg hugsaði við mær sjálvari, tá eg sum helst túsundavís av øðrum føroyingum sat og hugdi at Degi og Viku, lagnudagin hjá Jørgeni Niclasen. Tað, sum eg her hugsi um, er sjálvandi, at maðurin sat undir so hørðum trýsti í tinginum, og megnaði ikki at fjala sínar kenslur. Og hvat ger myndamaðurin hjá sjónvarpinum? Hann letur myndatólið suma inn á henda landsstýrismannin, sum hesa løtuna, letur okkum øll vita, at hann heldur ikki er meira enn eitt menniskja. Heldur ikki



kann tað hava verið stuttligt hjá honum at vera umringaður av myndamonnunum hjá føroysku bløðunum, sum gingu rundan um hann sum flugur um sukur og royndu at finna tann rættan vinkulin og vita, um teir ikki fingu júst tann vinkulin, har tárini renna.

Sjálvandi virkaði tað eisini undarligt, at ein maður sum hann, sum sat í Føroya Landsstýri við største málsøkinum undir sær, setti seg at gráta framman fyri øllum Føroya fólki. Hann átti at kunnað uppført seg meira professionelt og ikki latið seg ávirkað so nógv fyri opnum skermi.

Ongin ivi um, at Jørgen vann samkenslu frá flestu hyggjarunum, men kortini tóktiskt ikki at vera nakar ivi um, at fólk hildu, at hann skuldi leggja frá sær. Um hann gjørdi nakað skeivt ella ikki, skal eg ikki gera meg klóka upp á ella ikki, men tað er heldur ikki tað, sum eg finnist at.

Eg haldi bara, at tað var ov nógv av tí góða at síggja ein mann snøgt sagt verða uppsagdan ella verða biðin um at siga upp fyri opnum skermi.

Eg meini so við, at fyrst varð øll viðgerðin sum hon var send beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi. Síðani skuldu vit hoyra ein samandrátt í tíðindasendingini á nátturða og alt umaftur í SvF, tá Dagur og Vika kom. Tá Dagur og Vika var liðug, so setti eg meg framman fyri telduna eina løtu, hugsaði um at fara at tjatta. Men so opnaði eg líka internetið fyrst, og tá mundi eg bannað við, tí har á Portalinum, sum foreldur míni hava til byrjunarsíðu, lá ikki minni enn eitt myndatema við Jørgeni Niclasen.

Gott nokk er tað stuttligt at síggja myndir frá ymiskum, men ikki frá einum tingfundi, sum fekk sjálvan Høgna Hoydal at blikna eina løtu, tí tað var so pínuligt. Og høvdu myndirnar so verið frá fundinum, men nei, har vóru meginparturin av Jørgeni.

Hvat fáa vit burturúr at síggja tílíkt? Øll seta vit okkum at stara okkum blind at eini keðiligari, men veruligari hending í fjølmiðlunum og aftaná tosa øll bara um, hvussu ræðuligt og ljótt tað var at gera so ímóti honum. Og eg eri ein av teimum.

Eg haldi simpulten, at tílíkt átti ikki at verðið sent beinleiðis. Vit høvdu ikki havt tað verri, um vit noyddust at bíða inntil viðgerðin var av, og so fingu at vita í stuttum, hvat hevði gingið fyri seg.
T
að er altíð lætt at vera bakklókur, tað veit eg, men har haldi eg, at summi kundi havt hugsað seg betur um.

**Marianna**




# STÓRA VETRARÚTSØLAN
# byrjar tórsmorgunin kl. 9.00

*Tórskvøldið og fríggjakvøldið er opið til kl. 20.00*
*Leygardagin er opið til kl. 17.00*

**Toystovan, Tvøroyri**
**tlf. 371612**


## Heimarøktin Vágar/Norðstreymoy

# Varaleiðari

Søkt verður eftir varaleiðara, ið hevur hug og hegni til at átaka sær nýggjar avbjóðingar í skipanini. Heimarøktin er ein stovnur í støðugari broyting, og tí krevst, at umsøkjarin er fúsur at átaka sær at ganga nýggjar leiðir innan eldraøkið.

**Varaleiðarin skal saman við økisleiðaranum kunna átaka sær at:**
- Leiða og fordeila arbeiðið við atliti til tørvin hjá brúkaranum og fíggjarkarmin hjá Heimarøktini
- Tilrættaleggja og luttaka í fakligu- og starvsfólkamenningini
- Menna og samskipa Heimarøktina
- Viðvirka til støðugt økt samstarv millum starvsfólkabólkarnar, eldrasambýlini og heimarøktina í økinum
- Skipa fyri visitatión, revisitatión og eftirliti við tænastuni við atliti til tænastustøðið, góðskuna og fíggjarligu støðuna í økinum
- Hava ábyrgdina av tilrættaleggjanini hjá lesandi og næmingum

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir fólki sum:
- Hevur hug og hegni at leita og fyrisita
- Hevur heilsu- ella sosialfakliga útbúgving
- Evnar at samstarva bæði við brúkara, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur royndir og kunnleika innan primeru heilsutænastuna
- Sær møguleikar ístaðin fyri forðingar, og er broytingarhugað

Royndir í fyrisiting og leiðslu er ein fyrimunur, eins og kunnleiki til teldu er ynskiligur.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, øksisleiðara á tlf. 333249.

**Setanar- og lønartreytir**
Arbeiðsstaðurin er skrivstovan á Oyrarbakka.
Starvið verður at seta frá 01. mars 2003 ella eftir nærri avtalu. Løn- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, fakligar royndir o.a. verður at senda til

**Heimarøktin & Serforsorgin**
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 13.02.03**
Umsóknin skal merkjast: »**Varaleiðari**«


Náttklæðir
frá Siri



siri
lív & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO 100 Tórshavn
Telefon 31 66 10 • Fax 31 66 10

Betula



Skógvarnir til tín, ið bert vil tær sjálvum tað besta

siri
lív & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO 100 Tórshavn
Telefon 31 66 10 • Fax 31 66 10

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin





Glasstovan søkir eftir einum tænaralærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir, har lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi. Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/léttur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Peter Hentze á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. mars 2003

****
GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ferðafólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

peter & peter • 320870

## Skrivstovufólk og Løgfrøðingur/deildarleiðari

**Toll- og Skattstova Føroya**

Á Kolvetnisskattadeildini í Klaksvík eru 2 størv leys at søkja.

Vilt tú vita meir?

Les starvslýsingina á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo